## ES fær forseta í næstu viku

Næsta hósdag verður eykatoppfundur í ES, tí tá skulu leiðararnir tilnevna tann fyrsta forsetan og tann fyrsta uttanríkisráðharran í samveldinum. Í einari kunngerð úr Bruxelles verður sagt, at ríkis- og stjórnarleiðararnir hava fingið fundarboð frá svenska forsætisráðharranum, Fredrik Reinfeldt, sum er formaður í ES hetta hálvárið. Dúgliga verður gitt, hvør fær tey bæði týdningarmiklu embætini. Sambært fjølmiðlunum hevur belgiski forsætisráðharrin, Herman Van Rompuy, góðar møguleikar at fáa forsetastarvið, og til starvið sum ES-uttanríkisráðharri tykist bretski uttanríkisráðharrin, David Miliband, vera besta boðið í løtuni.



## Fer til Hiroshima og Nagasaki

Sum tann fyrsti amerikanski forsetin ætlar Barack Obama at vitja japonsku býirnar Hiroshima og Nagasaki, sum vórðu lagdir í oyði í 1945 av amerikonskum kjarnorkubumbum. Obama fer til Japan fríggjadagin, men tað verður tó ikki á hesari ferðini, at hann fer at vitja teir báðar býirnar, tí tíðarætlanin loyvir tí ikki, skrivar AP. Men í samrøðu við japanska sjónvarpið NHK sigur forsetin, at hann ætlar sær at vitja Hiroshima og Nagasaki, áðrenn hann fer frá. Í 1984 var fyrrverandi forsetin Jimmy Carter í Hiroshima og Nagasaki, men tað var fýra ár eftir, at hann var farin úr embætinum.

# Nýggj bók við gomlum havnarmyndum



*Vágsbotnur eftir 1932. Rybergshandil helt til her frá 1765 til 1785, seinni bygdi kongiligi handilin her. Húsini vinstrumegin frá, handilin hjá Jóan Jakku Joensen, skómakara, sum hann bygdi í 1925 og setti eina hædd omaná í 1932. Í 1927 keypti Zacharias Heinesen ognirnar hjá Restorffshandilnum, sum fór fallit og læt upp stásiligan handil her. Í 1953 flutti handilin hjá Valdemar Lützen inn í húsini høgrumegin. Síðani 2005 hava húsini hýst virkseminum hjá Miðlahúsinum. Bilurin vinstrumegin er ein Ford T, sama slag, sum tann fyrsti bilurin, sum kom til Føroyar í 1922. Hin bilurin er ein Ford A, sum varð framleiddur frá 1927-31, meðan Ford T varð framleiddur frá 1908-27*

**Onnur bókin í røðini »Traðkaðu fólkinum slóð« hjá Finni Johansen er komin í bókabúðirnar. Í bókini eru 270 fotomyndir, sum mynda Havnina frá 1900 til 1940**

BÓKAÚTGÁVA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Enn ein bók í røðini »Traðkaðu fólkinum slóð« hjá Finni Johansen er komin í bókabúðirnar. Fyrra bókin kom fyri trimum árum síðani, og onnur bókin hevur undirheitið »Havnin 1900-1940«.

Finnur Johansen skrivar, at í ár 1800 búðu 600 fólk í Havn og í 1900 færri enn 1700.

- Nú eftir kommunusamanleggingina um aldamótið 2000 brúgva millum 18.000 og 20.000 fólk í Tórshavnar kommunu, og tað eru næsta 40% av fólkatalinum í Føroyum, skrivar Finnur Johansen.

- Í 1866 gjørdist Tórshavn sjálvstøðug kommuna, og í 1909 varð hon keypstaður, men um aldamóti 1900 var menningin í samfelagnum hundrað ár eftir grannatjóðirnar, her vóru hvørki vegir, havnir, telefon ella elektrisitet oga t kalla einki regluligt ferðasamband.

Í 1894 varð Kommunuskúlin bygdur og í 1896 Meinigheitshúsið, í 1898 varð fyrsta vatnverkið gjørt, og eftir 1900 fór kommunan undir at stykkja út oman fyri Vaglið. Havnin fekk sít fyrsta elektricitetsverk í 1921, og í 1929 varð fyrsta byggistig av Tórshavnar Havn liðugt, og menningin fór nú at ganga við rúkandi ferð.

- Fátt sigur søguna so væl sum fotomyndir, og endamálið við bókini er at siga ein part av Havnar søgu tíðarskeiðið frá 1900 til 1940, sigur Finnur Johansen.

Ímorgin, hósdagin, klokkan 16 Finnur Johansen upp framsýning við myndum úr bókini í Snarskivuni hjá Tórshavnar Kommunu. Á framsýningini síggjast um helvtin av teim 155 myndunum, sum eru við í nýggju bókini.

- Myndirnar eru allar frá Føroya Fornminnissavni, og sum eg eftir avtalu eri sloppin at brúka. Tær eru tíðarfestar so neyvt, sum tað hevur borið til, og tekstur, sum sigur frá tí, ið sæst á myndini og onkrar søgur, sum knýttar eru at staðnum og grannalagnum, er settur til, sigur Finnur Johansen.

### Skjalasavnsdagur

Eisini er Skjalasavnsdagur leygardagin 14. november 2009. Landsskjalasavnið hevur valt at leggja dent á tilfar, ið hevur við Havnina at gera, nú hon hevur 100 ár á baki sum fólkavald kommuna.

Skjalasavnsdagin hugleiða Arne Thorsteinsson, fyrrverandi landsantikvarur, og Finnur Johansen, rithøvundur og fyrrverandi býráðslimur, um Havnina.

Arne Thorsteinson hugleiðir um »Høvuðsstaðin, ið var« og Finnur sigur frá »Havnini í 100 ár«. Áhugaverdu hugleiðingarnar verða at hoyra í loftsstovuni hjá Føroyamálsdeildini leygardagin klokan 15.

Bókin Traðkaðu fólkinum slóð 2, fæst í bókabúðnum og á framsýningini fyri 270 krónur.




*Finnur Johansen hevur umframt hesa bókina eisini skrivað bøkurnar »Vatnveitingin í Tórshavn í 100 ár«, sum kom út í 1998, »Føroya maskinskúli í 40 ár«, sum kom í 2005 og »Traðkaðu fólkinum slóð«, sum kom út í 2006 – umframt tað hevur hann skrivað greinir eitt nú um hús og fólk í Havn*

*Mynd: Álvur Haraldsen*